# tle Of The Bands



lovandi. Rættiliga fitt av fólki var komið saman, tá Deja Vu fór á pallin, og tey sluppu at uppliva ein bólk, ið breyt frá tí annars fjølbroyttu skránni higartil. Deja Vu var sætti bólkur á pallin og tá høvdu vit longu hoyrt: Harðan skitnan rokk úr Niðurlondum og Serbia, penan fólka rokk úr Danmark, siðbundnan blús og rokk'n'roll úr Hvíta Ruslandi og eletriskt kendan rokk úr Spania. So sveimandi rokkurin hjá Deja Vu vísti bara enn eina síðu av ríku tónleikaumboðanini á konsertini.

Limirnir í Deja Vu vóru ymsir á máli um avrikið, tá teir komu av pallinum. Rúni Højgaard trummuleikarin helt, at konsertin fyri hansara viðkomandi hevði gingið sera væl, meðan Flóvin Viderø var eitt sindu verri nøgdur.

- Fyri mítt viðkomandi føldi eg tað ikki veruliga, segði hann. Jan Zachariassen umboðsmaður var illa nøgdur við ljóðið, ið hansara bólkur hevði fingið, men samstundis helt hann, at hetta tó ikki var ein trupulleiki, ið Deja Vu vóru einsamallir um, tí eingin bólkur hevði serliga gott ljóð. Hetta er púra satt, men samstundis krevur sveimandi tónleikurin hjá Deja Vu munandi meira av ljóðinum fyri at virka optimalur, meðan skitin rokkur ikki á sama hátt hevur tørv á góðum ljóði.

Ljóðtrupulleikarnir vóru ein natúrlig avleiðing av mátanum, ið GBOB verður avviklað. Somu ljóðmenn skuldu taka sær av ljóðinum hjá øllum bólkum, hetta merkti, at teir stóðu í hørðum tónleiki allan dagin í sambandi við ljóðroyndirnar, og síðan 6 tímar í sambandi við konsertina. Menninir vóru deyvir áðrenn tiltakið fór í gongd.




*Japanska framførslan var tann mest orginala á kvøldinum*



*Donsku Cody fingu 5. pláss, men hóast hetta, vóru teir keddur um, at Deja Vu ikki vann*

# Hvíta Russland og Danmark hildu við Deja Vu

**Sjónvarpsvertur úr Hvíta Russlandi og GBOB luttakarin úr Danmark vóru ikki nøgd við úrslitið av GBOB finaluni, ikki tí teirra lond ikki vunnu, men tí Deja Vu ikki vunnu.**

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Eitt fimta pláss er fullkomiliga líkamikið fyri okkum, segði ein av tónleikarunum í danska bólkinum Cody, og helt fram

- So leingi sum Deja Vu ikki vinnur, so hava dómararnir ikki skil fyri, hvat teir gera.

Teir vóru eisini alt annað enn sannførdir av amerikanska bólkinum Heavy Mojo.

Eftir ljóðroyndina fyrr um dagin, gjørdi Líggjas Olsen úr Deja Vu samrøðu við sjónvarp úr Hvíta Russlandi. Vit fingu orð á sjónvarpsvertin um kvøldið, tá konsertin leið móti endanumm. Hon avdúkaði, at hennara boð upp á ein vinnara var Deja Vu, tí bólkurin var veruliga góður.

Men tey vóru ikki teir einastu, ið ikki vóru nøgd. Eftirveitlan í alt ov lítla dansistaðnum Thirst var merkt av, at fólk vóru í eitt sindur ringum lag og skuffaði. Men hetta er natúrligt í eini kapping. Her er jú talan um 24 bólkar og hjálpar- og vinfólk teirra, ið hava tapt.

Tað var ein tøtt kapping og eingin skaraði veruliga framúr, so meiningarnar vera altíð deildar, um hvør átti at vunnið, og hvør ikki átti at vunnið.

Hetta sama var galdandi í fjør, tá Kopek vann. Eg var staddur á tí konsertini, og stóð púra óskiljandi mótvegis tí úrslitinum, og eftir at hava hoyrt bólkin aftur í ár, skilji eg enn ikki, at hesin bólkur kundi vinna í fjør.

Flestu londini høvdu góðar framførslur, bert Teiland datt veruliga niður ímillum við einum sera sera vánaligum bólki, har sangarin uttan iva var versta songrødd á kvøldinum, og Moldova, ið ljóðaði sum eitt boð uppá ein moldovskan Eurovision vinnara.

Áðrenn úrslitið varð almannakunngjørt, var bólkurin, ið eg metti hava bestan møguleika fyri at vinna, Deja Groove úr Avstralia, við blásarum, rappi og jass- og reggae kendum tónum, skapti bólkurinThe London Astoria um til eina stóra veitslu. Men hesin bólkur varð ikki nevndur millum teir fremstu. Eg var eisini sannførdur um at Deja Vu kundi gera seg galdandi, men so varð heldur ikki.